Starvslýsing

Trivnaðartænastan

## Pedagogur ella heilsurøktari til Bústovnin á Eirargarði 16A/BN

Søkt verður eftir pedagogi ella heilsurøktara til eitt fulltíðar farloyvisstarv til frá 01.09. 2008 til 31.08.2009 ella eftir nærri avtalu. Arbeiðstíðirnar eru skiftandi, og roknast skal við morgun-, kvøld-, náttar- og vikuskiftisarbeiði.

Á bústovninum búgva 15 menningartarnað fólk, har fleiri hava likamlig brek. Dentur verður lagdur á, at tann, ið settur verður, er likamliga væl fyri og er áhugaður í at luttaka aktivt í øllum avbjóðingum og er opin fyri nýhugsan. Harafturat er neyðugt at arbeiða sjálvstøðugt og at samstarva við onnur, umframt at vera førur fyri at taka ábyrgd og avgerðir í arbeiðinum.

**Setanartreytir:**
Starvið verður sett sambært sáttmála millum Fíggjarmálaráðið og Føroya Pedagogfelag. Um Pedagogur, ið frammanundan er tænastumaður, verður settur í starvið, heldur tænastumannasetanin fram, og verður lønin sambært sáttmála millum Fíggjarmálaráðið og Føroya Pedagogfelag. Um eingin pedagogur søkir starvið, verður starvið sett við hjálparfólki sambært sáttmála millum Føroya Pedagogfelag og Fíggjarmálaráðið. Setanarøkið umfatar Nærverkið og deildir undir tí.

Nærri upplýsingar um starvið fáast við at venda sær til Bjørg Mohr, leiðara á tlf. 315422 ella 215423.

**Umsókn:**
Umsóknir við hjáløgdum próvskjølum, viðmælum og C.V. skulu sendast til:
Bústovnurin á Eirargarði 16 A/BN
FO-100 Tórshavn
Att: Bjørg Mohr, leiðari

**Umsóknarfreist: 1. august 2008**

**Les meira á www.naerverk.fo/leys størv**

Nærverkið kemur út til borgaran at veita tænastur, ið fevna um eitt nú stuðul, tilboð til borgarar við serligum tørvi og tænastur til barnafamiljur og eldri. Nærverkið er sjálvstøðugur stovnur undir Almanna- og heilsumálaráðnum. Umframt Meginskrivstovuna, ið hevur yvirskipaðu leiðsluna, eru fýra deildir: Heimatænastan, Trivnaðartænastan, Stuðulstænastan og Barnatænastan. Nærverkið leggur áherðslu á nærleika, umsorgan og professionalismu í øllum lutum. Umleið 1400 fólk starvast í Nærverkinum.

NÆRVERKIÐ

Meginskrivstovan · Postsmoga 3037 · 110 Tórshavn · Tel 36 00 00 · Faks 36 00 01 · meginskrivstovan@naerverk.fo

www.naerverk.fo




Gingið verður av oyggjarvegnum til Leynar.

Leiðin liggur framvið Skælingsvatni, har Nykurin helt til.

Vit njóta friðin í vøkru náttúruni ímillum Sátuna og Skælingsfjall.

Fyri sunnan liggur Koltur, fyri vestan Vágaland. Eitt satt fragd fyri eyga!

Um tilber vitja vit træskera.

Aftaná eina lætta máltíð á úticafé í Leynum, verður koyrt aftur til Tórshavn.

Túrurin er sera lætt gongdur.

Farið verður úr Tórshavn leygar- og sunnudagar kl. 14:00.
Sjálvandi eru tær báðar Lama og Alpacha við á túrinum.

Tilmelding á **tlf. 28 54 55** í seinasta lagi dagin fyri.

Aðrar tíðir kunnu avtalast.

# Tíðin rennur

## - Nýggj fløga við Stanley Samuelsen

Konsertir: Vágsbotni, Reinsaríðnum 14. juli kl. 20.00
Fuglafirði, Ribarhus 15. Juli kl. 20.00
Mini G!
Miðvági, Cafekvøld 24. juli
SMS á torginum 26. juli
Miðlahúsinum 28. & 29. juli

www.myspace.com/stanleysamuelsen
www.stanleysamuelsen.dk

Stuðlað hava Sosialurin, Dimmalætting, Sendistovan, Bilrøkt




www.sosialurin.fo Leys størv á Sosialinum




## Bókhaldari

**Ein fyritøka í vøkstri krevur eisini vøkstur í umsitingini.**

Tí søkja vit nú eftir fólki at arbeiða í bókhaldi okkara hálva tíð. Framman undan eru trý fólk í starvi í bókahdlinum.

Starvið fevnir um alt vanligt bókhaldsarbeiði, herundir bókingar av inntøkum og útreiðslum, avstemmanir og debetor- og kreditorrøkt.

Vit kunnu bjóða tær eitt avbjóðandi starv í einum spennandi umhvørvi í eini fyritøku, sum er í støðugari menning, og sum í dag virkar á fleiri miðlapallum. Og vit ímynda okkum, at tú ert til reiðar at byrja í nýggja starvinum í seinasta lagi 1. september – men um møguligt gjarna fyri hetta.

Er áhugi at frætta meira um starvið, ber sjálvandi til at ringja til okkara á telefon 341800 og tosa við Jákup Mørk ella Johonnu Vang. Sjálvandi ber eisini til at senda teldubræv til jakup@sosialurin.fo ella til johanna@sosialurin.fo

Umsóknir við viðkomandi upplýsingum eiga í seinasta lagi tann 20. juli at verða sendar til

Sosialurin
Postsmoga 76
FO-110 Tórshavn

*Sosialurin hevur vaksið um virksemi frá at verða eitt tíðindablað , til at verða størsta fjølmiðlafyritøkan í landinum. Fyritøkan umfatar Sosialin, Rás2, S-lýsingar, Portalurin, Sportal, Planet.fo, Rás1 og Miðlahúsið. Tilsamans starvast í dag umleið 45 starvsfólk í fyritøkuni.*